# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Konstruktivt máluppskot frá Skaale

At eita Christian ella William er púra vanligt í Føroyum. Hóast hetta, so eiga c og w ikki innivist í føroyska alfabetinum. Hetta hevur so tinglimurin hjá Tjóðveldi, Sjúrður Skaale, skotið upp at gera nakað við. Uppskotið hjá honum er rætt og slætt at geva hesum stavum innivist í føroyska alfabetinum við lóg.

Uppskotið er áhugavert og hevur eina sakliga viðgerð uppiborið. Tað kann altíð diskuterast, um lóggáva um alfabet er neyðug, men í hvussu so er, so er neyðugt, at føroyingurin kennir, at hann hevur ræði á sínum egna máli. Vit síggja alt ov nógv til, at sjálvútnevndir málverjar á ivasomum grundarlag vilja skeikla málið einstakar vegir, og tað er heldur ikki frítt fyri, at ein óneyðug ræðsla fyri donskum máli skínur ígjøgnum viðhvørt.

Størsti vandin hjá føroyska málinum er ikki fremmand árin. Størsti vandin er, at føroyska málið verður gjørt til nakað, sum bert ein smøl elita skal kunna úttala seg um. Vit eru ikki har enn, men vit eru væl áleiðis. Hetta sæst á indignatiónini frá ávísum síðum yvir, at ein tinglimur – sum annars per definitión eigar at kunna hava eina meining um alt – skal ditta sær at seta spurningar við málkósina, sum seinastu árini hevur verið sett við ivasomum mandati.

Koma vit hartil, at bert ein lukkað losja skal kunna úttala seg um málspurningar, so er deyðin í durinum hjá føroyska málinum.

Tíbetur eiga vit enn eitt livandi mál í menning, og eingin grund er at stúra fyri málsliga sjálvsálitinum hjá føroyingum, hóast hetta verður gjørt eitt nú í óneyðuga restriktivu marknaðarføringslógini. Føroyingar eru ikki so málsliga óhjálpnir, at teir noyðast at vera vardir frá útlendskum máli við lóg. Ei heldur eiga vit at halda fram við at økja um munin millum tað mál, ið føroyingar brúka í dagligdegnum og tað mál, ið smalt verður definerað sum »rætt føroyskt«.

Einki argument hevur verið ført fram fyri, at góður málburður tekur skaða av at innføra c, q, w og x í føroyska alfabetið. Duga føroyingar hampuligan málburð og at benda rætt, so stendur væl til, óansæð alfabetið.

Tað vildi verið spell, um kjakið um konstruktiva uppskotið hjá Sjúrði Skaale druknaði í málkonservatismu og undirmetan av málsliga sjálvsálitinum hjá føroyingum. Hetta hava vit sæð eitt sindur av í farnu viku. Tó hava eisini konstruktivar reaktiónir verið. Uppskotið hjá Jeffrei Henriksen um at innlima burturvilstu stavirnir í føroyska alfabetið – t.v.s. at skoyta teir upp í verandi alfabet – sampakkar hampuliga væl við uppskotið hjá Sjúrði Skaale. Kanska okkurt spyrst burturúr.

Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## So var tað ferðavinnan

**EDVARD Í SKORÐINI JOENSEN**



Ein køld, slavin hond verður løgd niður eftir bakinum á øllum, sum roynir at hóra so nøkulunda undan her á landi. Krøvini uttan eftir eru mong og strong, og viðhvørt tykjast tey órímilig eisini. Og politiska ómegdin innan eftir er ræðandi. Tað sær ikki mætari út enn, at setningurin er, at í Føroyum skal fólk ikki liva og virka. Landið er fyri fugl og seyð.

Seinasta nosið var at hoyra um í útvarpinum um dagarnar, tá bóndin í Kirkjubø greiddi frá, hvussu hansara vinnuvegur nú er fyri hóttafalli.

Í frásøgn síni um, tá Tróndur gamli fyrireikaði norðanmenn at fara... “til Havnar suður á tann trúnarfund´”, letur I.P.G. hann siga soleiðis:

“Skulum vær níga Ólavi kongi,
skulum vær honum lúta?
Skulum vær krúpa so í krógv,
tá man mangur súta!”

Í dagsins Føroyum tykist einki at sleppa at virka, uttan at fylgja ES góðkendum reglum og treytum. Ivaleyst í fleiri førum skilagóðum og neyðugum. Men viðhvørt tykist tað ov nógv av tí góða. Tað kann ikki bera til, at eingi frávik ella tillaging til lokal viðurskifti eru møgulig.

Í summar var tað ullin, sum skuldi hava góðkenning. Ímynda tær, kæri lesari! Djóralækni á hvørji rætt at góðkenna 70.000 seyðir áðrenn royting. Tað skulu nógvir djóralæknar til, tí ikki er óvanligt, at farið verður á fjall í fleiri hagapørtum sama dag.

Bóndin í Kirkjubø, sum hevur lagt seg eftir at fremja í verki tað, sum føroyingar, ikki minst politikarar, dagliga tosa um. At liva av egnum tilfeingi. Hann hevur roynt at bygt upp eina vinnu, har hann knýtir saman tað søguliga tilfeingið, staðið eigur, og tað, ið vinnist av egnum lendi. Nevniliga seyðin úr haganum.

Men nú er komið í ljós, at tað ber als ikki til, tí loyvt er ikki at selja kjøtið vegna manglandi heilsuváttan. Trupulleikin er bara, at slík váttan fæst ikki í Føroyum, tí vit hava ikki førleikan til at geva hana. Hyggjuráðini eru tí, at so má vinnan, sum livir av hesum, halda uppat.

Ferðavinnan verður dúgliga umtalað sum tað nýggja beinið, vit skulu standa á. Í Kirkjubø hevur hetta verið víst í verki í nøkur ár. Men nú dregur samanum.

Álvaratos. Nú er tíðin saktans komin til, at ábyrgdarhavandi, tað vil siga politiski myndugleikin, ger av, um vit skulu taka hesa vinnu í álvara, ella bara lata hana fara. Higartil hevur hon verið kastibløka millum ymsar landsstýrismenn. Seinast varð hon gjørd til uttanríkismál. Alt gott um at ferðast uttanlands. Men tað er hóast alt av vinnuni her á landi, vit skulu liva.

Kirkjubøbóndin er eitt gott dømi um, at tað kann bera til. Men hann ger tað ikki einsamallur. Og tá tey, ið fegin vilja ráða yvir vinnuni, ikki hava hugflog – ella hvat tað nú er, ið vantar – so er einki at gera. Ikki gerst tað lættari av, at ymsu málsøkini rekast millum ymisk aðalráð, alt eftir hvussu politisku kabalirnar skulu ganga upp, og hvussu nógvar landsstýrismenn, og harvið aðalráð, vit skulu hava.

## Ikki av føroyskari ætt

**ZAKARIAS WANG**



Onkur hevur funnist at ti sum eg segði um at Svend Auken ikki var av føroyskari ætt.

Faðir hansara Gunnar Auken var bóndasonur úr Norðurjútlandi. Svend hevði eisini Gunnarsen til millumnavn.

Móðir hansara Kirsten Auken var dóttir Svend Lomholt, lækna, og hon varð fødd í 1913. Í 1920 doyði móðir hennara Maria Kirstine Sigumfeld Beck..

Í 1925 giftist Svend Lomholt uppaftur við Gudrun Finsen, sum var fødd ár 1900 og var dóttir Niels Ryberg Finsen og Ingeborg Dortheu Balsev, sum var dóttir C. F. Balslev, biskup.

At Niels Finsen var innborin føroyingur er vist og satt. Men hann kann so ikki teljast millum forfedrarnar hjá Svend Auken.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**StøDD:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.